## Lloyds nú almennur




Bretska stjórnin eigur nú meirilutan í tí kenda bankanum Lloyds Banking Group (LBG). Um vikuskiftið boðaði stjórnin frá, at hon hevur økt sín ognarlut í bankanum úr 43 prosentum í 65 prosent. Samstundis hevur stjórnin veitt 260 milliardir pund í trygd fyri vánalig lán hjá bankanum. Avtalan við stjórnina sigur tó, at bankin skal sjálvur átaka sær vánalig lán fyri 25 milliardir pund. Lloyds Banking Group varð til fyr í ár, tá Lloyds TSB keypti bankan HBOS, sum var komin í álvarssamar trupulleikar av fíggjarkreppuni og hevði næstan 11 milliardir pund í halli í 2008.

## Gjaldsjavni órógvar rentuna

Takkað verði teimum góðu inntøkunum frá oljuni í Norðsjónum og handilsskipaflotanum hevur Danmark avlop á gjaldsjavnanum.Hetta eru pengar, sum á hvørjum ári fara beinleiðis í gjaldoyrakassan hjá Tjóðbankanum. Men lágur oljuprísur og minkandi inntøkur hjá handilsskipaflotanum gera, at inntøkurnar uttaneftir minka, og tá so er, veksur trýstið á donsku rentuna, sigur Bo Overvad, búskapartfrøðingur í bankanum Alm. Brand, við DR. Búskaparfrøðingurin sigur, at danska rentan kann hækka nógv, um gjaldsjavnin fær hall ístaðin fyri avlop.

# Framleiða útflutnings

**Faroe Marine Products hevur í fleiri ár turkað fiskahøvd og –ryggir til útflutnings. Virkið í Leirvík hevur millum 50 og 60 fólk í starvi, og framleiðir umleið 10.000 tons av turkaðum slógvi um árið**



ALTERNATIV VINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Søgan hjá høvdavirkinum gongur væl aftur um sjálvt høvdavirkið.

– Vit høvdu eitt lýsivirki, og vit sóu so góðar møguleikar í hesum, at vit valdu at flyta virkið úr Gøtu og higar til Leirvíkar. Tá so bygningurin var komin upp at standa, vóru tíðirnar vorðnar so mikið góðar, at vit fingu ikki fatur á meiri livur, og so máttu vit í holt við okkurt annað, sigur Eirikur á Húsamørk, stjóri og eigari av Faroe Marine Products.

Bygningurin stóð so har, og um tað mundið var FMP við í einari verkætlan, sum millum annað gekk út upp á at kanna, hvør rávøra kundi gagnnýtast. Henda verkætlan var eitt nú stuðlað av NORA.

– Vit høvdu gjørt ymsar royndir við at turka ymiskt, eisini meðan vit høvdu lýsivirkið, tí hetta var ein eyðsýndur møguleiki fyri eitt virki, sum liggur nakað burtur frá bygdum øki og nær við eina góða orkukeldu. Og tá vit so ikki fingu meiri rávøru til lýsiframleiðsluna, valdu vit at leggja á hendan bógvin, sigur Eirikur á Húsamørk.

Og júst tað, at høvdavirkið liggur beint við síðuna av brennistøðini hjá IRF ger, at teir kunnu gagnnýta avlopshitan, sum brennistøðin gevur frá sær.

– Tað er avgerandi, at vit kunnu fáa eina orku, sum ger tað møguligt hjá okkum at framleiða eina vøru til Nigeria, har ein miðal dagløn liggur um einar 10 krónur. So hóast vit hava nógvar kundar, er ikki talan um ríkar kundar, og tí er tað so týdningarmikið at hava ein rímiligan orkukostnað. Saman við einum effektivum virki ger tað, at vøran ikki gerst ov dýr, sigur Eirikur á Húsamørk.

### Fleiri sorteringar

Høvdavirkið víðari framleiðir tað, sum fyrr varð tveitt burtur, tað, sum fyrr varð rópt fyri slógv. Men teimum dáma betur at kalla tað fyri høvd og ryggir.

– Vit hava turkiklivar, sum vit seta vøruna inn í fyri at torna. Hetta eru klivar, sum eru teldustýrdir, so vit kunnu í praksis turka hvat tað skal verða, sigur Eirikur á Húsamørk.

Rávøruna fáa teir frá virkjum kring meginpartin av landinum.

– Tað er ógvuliga týdningarmikið, at vøran verður skild, tá hon kemur inn á virkið. Tá vøran er so lutfalsliga dýr fyri keyparan er tað av stórum týdningi, at hann fær tað, sum hann rindar fyri, sigur Eirikur á Húsamørk.

Tað er tí ógvuliga sundurbýtt, hvat goldið verður fyri. Manglar eitt høvd til dømis lippuna, hevur tað ein annan prís enn eitt høvd, sum hevur lippu. Er uggabeini upp á er tað aftur ein annar prísur. Og so framvegis.

– Bara eitt toskarhøvd verður skilt í seks ymiskar bólkar. Men tað merkir kortini ikki, at vit nýta nógva orku at sortera vøruna, tí ymsu virkini hava framman undan lagt seg eftir ávísum framleiðslum, so høvd og ryggir eru sorteraðir eftir tí, sigur Eirikur



*Eirikur á Húsamørk er stjóri og eigari av Faroe Marine Products*